Innihald

Inngangur 2
Lýsing av gongdini í búskapinum 4
Almenn fíggjarmál 20
Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2027 23
Inntøkur landskassans í 2027 23
Útreiðslur landskassans í 2027 24
Løgur í 2027 25
Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2026 27
Rakstrarjáttanareftirlit 29
§ 1 Løgtingið 29
§ 2 Løgmansfyrisitingin 30
§ 3 Fíggjarmál 31
§ 5 Uttanríkis- og fiskivinnumál 32
§ 6 Vinnumál 33
§ 7 Mentamál 34
§ 11 Heilsu- og orkumál 36
§ 12 Almanna- og bústaðamál 37
Inntøkujáttanareftirlit 38
Løgujáttanareftirlit 41

Inngangur

Sambært § 9 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, samstundis sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram, leggja fram frágreiðing (Búskaparfrágreiðing II), sum gjølligari lýsir og metir um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum og greiðir frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum. Hetta er fyrsta uppskot til løgtingsfíggjarlóg, sum sitandi samgonga, sum varð skipað 13. apríl 2026, leggur fram.

Úrslitið hjá landinum í 2025 var avlop á um 11 mió. kr. Avlopið kom í stóran mun av, at fleiri týðandi inntøkur hjá landinum vóru hægri enn væntað, og at lítið varð brúkt av framfluttum løgujáttanum. Nevnast kunnu skatturin av vinningi frá sølu av veiðirættindum, skrásetingargjaldið og vanligi landsskatturin, sum øll vóru hægri enn væntað í samtyktu fíggjarlógini fyri 2025. Hinvegin kann nevnast, at loyvisgjaldið á alivinnu, felagsskatturin og meirvirðisgjaldið vóru lægri enn væntað í samtyktu fíggjarlógini fyri 2025.

Stórt trýst verður á útreiðslurnar hjá landi og kommunum næstu árini, serliga orsakað av broyttari fólkasamanseting. Stórur búskaparvøkstur hevur verið í fleiri ár, og lyklatøl benda á, at búskaparvøksturin hevur tikið dik á seg í 2026. Fíggjarmálaráðið roknar við lægri búskaparvøkstri í 2027, sammett við í 2026, sum serliga kemur av altjóða politiskum órógvi og óvissu um gongdina í heimsbúskapinum, høgum orkuprísum og væntaðum rentuhækkingum næstu 1-2 árini.

Ein útreiðsla hjá landinum, sum kann væntast at vaksa næstu árini, er rentuútreiðslurnar av skuldini (brutto). Rentuútreiðslurnar fara at vaksa, so hvørt sum verandi skuld verður endurfíggjað til hægri rentu, sammett við rentustøðið, sum hevur verið síðstu árini. Tó hækka rentuútreiðslurnar, brutto, væntandi ikki í 2027, tí eingi lánsbrøv hjá landinum skulu endurfíggjast í 2027. Roknast kann kortini við, at frá 2028 fara renuútreiðslurnar, brutto, at vaksa nakað. Harafturat fer skuldin at hækka nakað av, at minstagjaldførið hækkar, so hvørt sum BTÚ veksur.

Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2027 er gjørt við støði í almennu framskrivaðu játtanarkørmunum fyri 2027. Inntøkurnar eru mettar varisliga. Lagt er til grund, at vøkstur verður í inntøkunum hjá landinum í 2027, sum samsvarar áleið við metta búskaparvøksturin í 2027.

Framrokningarnar av inntøkum og útreiðslum í uppskotinum eru dagførdar og grundaðar á verandi lóggávu og bundnar raðfestingar. Inntøkurnar í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2027 eru framroknaðar við støði í søguligum tølum fyri inntøkur og annars við støði í fyritreytum og lóggávu, sum er galdandi í løtuni. Inntøkur og útreiðslur eru framroknaðar við ársins prísum í 2027 og framroknaðar við føstum prísum árini 2028 og frameftir.

Stórur partur av inntøkunum í fíggjarlógini eru skattir og avgjøld, sum ávirkast av búskaparligu sveiggjunum í samfelagnum yvir tíð. Inntøkusíðan í fíggjarlógini er tí fyri stóran part grundað á metingar um gongdina í búskapinum.

Útreiðslusíðan er ikki eins torfør at meta um, av tí at størsti parturin av útreiðslunum er grundaður á politiskar raðfestingar av tænastum og veitingum, sum samtyktar eru við løgtingslóg, at almennu Føroyar skulu bjóða. Óvissan á útreiðslusíðuni snýr seg í stóran mun um gongdina í rentum, gongdina í oljuprísum og um úrslitini av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Sum grundarlag undir metingunum um búskaparvøkstur næstu árini verða brúkt søgulig tøl, vitan um búskapargongdina síðstu árini og vitan um gongdina innan ymisk búskaparlig vísitøl. Metingar hjá Búskaparráðnum og ymiskum altjóða stovnum verða eisini brúktar sum partur av grundarlagnum at meta um búskaparvøksturin og inntøkurnar hjá landinum næstu árini.

Eisini skal viðmerkjast, at í framrokningunum er lagt upp fyri serligum viðurskiftum í ávísum vinnugreinum, har ið umstøðurnar tala fyri tí. Í fyritreytunum fyri 2027 verður vøksturin í BTÚ mettur til um 4,5% (ársins prísir). Metingin hjá Fíggjarmálaráðnum er grundað á eina varsemisreglu.

Skatta- og avgjaldsinntøkur, ið eru grundaðar á inntøku og nýtslu, til dømis vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, verða í fyritreytunum settar at vaksa varisliga, tað er á leið við sama vøkstri sum metti vøksturin í BTÚ í 2027. Tó eru gjørdar serligar metingar út frá fyritreytunum fyri játtanini á teimum inntøkujáttanum, har tað verður mett neyðugt, og har, ið umstøðurnar tala fyri tí.

Fyritreytirnar fyri framskrivingunum av rentuútreiðslunum eru metta gongdin í landskassaskuldini og útlitini fyri rentugongdini komandi 1-2 árini. Altjóða rentustøðið hækkaði munandi í 2022 og 2023, men í 2024 og 2025 lækkaði rentustøðið aftur. Roknað verður við, at rentustøðið í Evropa hækkar nakað næstu 1-2 árini. Rentugongdin næstu 1-2 árini er treytað av, hvussu prísgongdin og gongdin á arbeiðsmarknaðinum verða og gongdin í øðrum búskaparligum lyklatølum.

Landskassin endurfíggjar vanliga um eina mia. kr. árliga av samlaðu lánsbrævaskuldini, sum er um 5 mia. kr. í 2026. Roknast kann við, at rentuútreiðslurnar fara at vaksa, sum frálíður. Einki lán hjá landinum skal endurfíggjast í 2027.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum og í altjóða búskapinum. Síðani er ein lýsing av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2027. At enda er frágreiðing um játtanarligu støðuna í ár, samanlagt og fyri hvørja grein sær. Her eru bara tiknar við tær rakstrar-, løgu- og inntøkujáttanir, sum verða mettar at víkja frá upprunaligu játtanini.

Lýsing av gongdini í búskapinum

Fíggjarmálaráðið metir, at útlit eru til hóvligan búskaparvøkstur næstu 1-2 árini, men eins og vanligt er, eru óvissurnar um metingarnar stórar. Júst nú kemur óvissan serliga av altjóða politiskum órógvi, óstøðugu útlitunum fyri búskaparvøkstri í heimsbúskapinum og av gongdini á altjóða olju- og orkumarknaðinum. Harafturat kunnu nevnast útlitini fyri prísvøkstri og rentuhækkingum næstu 1-2 árini og møguligar ávirkanir av hesum á altjóða fíggjarmarknaðin.

Mynd 1

Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum, broyting í % um árið, 2005-2027



Viðm.: Tølini fyri 2025 til 2027 eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarnum.
Kelda: Hagstovan, metingar frá Búskaparráðnum og Fíggjarmálaráðnum.

Lyklatøl benda á, at búskaparvøksturin tók dik á seg í 2025, sammett við í 2024, og at vøksturin er hildin fram í 2026. Ein orsøk til lága vøksturin í 2024 var verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum, sum darvaði vøkstrinum. Í mynd 1 omanfyri síggjast metingar av gongdini í BTÚ í 2025 og 2026. Forsøgnin hjá Fíggjarmálaráðnum fyri 2027 er eisini víst í myndini.

Greið tekin eru um, at realbúskaparliga virksemið innlendis í Føroyum er vaksið í ár, sammett við í 2025. Lyklatølini vísa, at innlendis virksemið í búskapinum er vaksið síðani miðskeiðis í 2025, og at vøksturin er hildin fram í 2026. Hetta sæst til dømis í lyklatølum fyri lønargjaldingar, starvsfólk og tilflyting, sum øll eru hækkað javnt og støðugt síðsta árið.

Forsagnir benda á, at rentustøðið fer at hækka nakað næstu 1-2 árini. Vøksturin í BTÚ í ársins prísum er mettur til umleið 3% í 2024 og umleið 6% bæði í 2025 og í 2026. Fíggjarmálaráðið roknar fyribils við vøkstri í ársins prísum á millum 4 og 5% í 2027.

Størstu orsakirnar til metta vøksturin í 2026 og 2027 eru vaksandi útflutningur í virði, stórar almennar og privatar íløgur og vaksandi privat nýtsla. Metingarnar eru grundaðar á eina varsemisreglu og yvirhøvur á ta óvissu, sum knýtir seg at tílíkum forsagnum.

Búskapurin í Føroyum og í Evropa er mótstøðuførur hóast óstøðug útlit og altjóða politiskt órógv

Hagtøl og lyklatøl benda á, at búskaparvøksturin er hildin fram og hevur tikið dik á seg í ár. Tað skal skiljast soleiðis, at greið framgongd og vøkstur síggjast í innlendis realbúskapinum.

Framgongdin í búskapinum higartil í 2026 sæst serliga á arbeiðsmarknaðinum og á nettoflytingini til Føroyar.

Vøksturin síðani 2021 er í stóran mun komin av vaksandi útflutningi, stórum uppsjóvarkvotum, av størri tøku av alilaksi (tó ikki í 2023), av betri býtislutfalli í uttanríkishandlinum og av javnt vaksandi innlendis eftirspurningi síðsta árið. Roknast kann við, at útflutningurin tilsamans hækkar umleið 9% í 2026 í virði. Fíggjarmálaráðið roknar eisini við vaksandi útflutningi í virði í 2027.

Síðstu mánaðirnar er prísvøksturin í Europa og í USA vaksin aftur, orsakað av ófriðinum í Miðeystri og av ávirkanini á altjóða olju- og orkumarknaðirnar. Miðbankar í USA og Evropa hava hækkað leiðandi renturnar síðstu mánaðirnar, og rentustøðið er hækkandi. Roknað verður nú við prísvøkstri á millum 2 og 3% í 2026 og í 2027.[1]

Stórar lønarhækkingar vóru í 2024 og 2025, sum hava gjørt, at reala inntøkan hjá flestu húsarhaldum er komin aftur er á støðið við inntøkurnar, áðrenn prísvøksturin tók dik á seg í 2021. Fíggjarmálaráðið metir, at privata nýtslan og eftirspurningurin kunnu hækka spakuliga og hóvliga næstu 1-2 árini, og at tað í so fall fer at geva eitt íkast til búskaparvøksturin.

Eisini kann nevnast, at nógv bendir á, at eitt sonevnt *super El Niño* veðurfyribrigdi fer at taka seg upp í Kyrrahavinum í 2026-27. Sambært almenna amerikanska havgranskingarstovninum[2] eru sannlíkindini um 95% fyri, at hetta veðurfyribrigdið fer at taka seg upp í Kyrrahavinum frá oktober til desember í ár.

Veðurfyribrigdið *El Niño* ávirkar vanliga veðurlagið um tað mesta av heiminum og hevur heitari sjógv við sær, sum førir til hægri lofthita, meira regn í summum økjum og minni regn aðrastaðni. Landbúnaðarframleiðslan í Landsynningsasia og Suðuramerika verður órógvað, framleiðslan og úrtøkan minka, og matvøruprísir hækka sannlíkt. Tað merkir saman við ófriðinum í Miðeystri, krígnum í Ukraina og stongslinum av Hormussundinum, at vandi eisini er fyri munandi hægri prísvøkstri næstu 1-2 árini, enn nógvar forsagnir siga.

Fíggjarmálaráðið roknar við, at arbeiðsloysið verður verandi lágt næstu 1-2 árini, hóast arbeiðsloysið kann hækka nakað, serliga um búskaparvøksturin minkar aftur. Metingin er grundað á, at arbeiðsmarknaðurin er sera væl fyri, at arbeiðsmegin er flytfør tvørturum vinnugreinar og øki, og at tilflytingin av útlendskari arbeiðsmegi er vaksin síðstu mánaðirnar. Harafturat er stórur tørvur á arbeiðsmegi í fleiri vinnugreinum.

Talið av starvsfólkum í innlendis búskapinum er methøgt og hækkar um 2% um árið (trendurin). Almenna skuldin er ikki høg, sammett við londini í OECD, og samfelagið hevur stóra nettoogn mótvegis útlondum. Forsagnir benda á, at rentustøðið í Evropa hækkar eitt vet seinni í 2026 og í 2027 (sí mynd 16).

[1] Keldur: Danmarks Nationalbank, Udsigter for dansk økonomi, 23. sept. 2026, og OECD Economic Outlook, Interim Report, sept. 2026.
[2] The US National Oceanic and Atmospheric Administration.

Føroyska bruttotjóðarúrtøkan er vaksin úr um 270 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2010 upp í mettar um 540 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2025. Í Danmark er bruttotjóðarúrtøkan mett til um 520 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2025. Í 2010 var bruttotjóðarúrtøkan fyri hvønn íbúgva um 20% hægri í Danmark enn í Føroyum.

Ábendingar um fløskuhálsar og trot á arbeiðsmegi síggjast framvegis í búskapinum, serstakliga innan byggivinnuna og aðrar handverksvinnur. Avleiðingarnar av hesum síggjast eisini á bústaðarmarknaðinum. Mynd 2 vísir sethúsaprísir til 2025. Myndin vísir, at bústaðaprísir eru hækkaðir nógv síðstu árini, og sambært ognarmeklarum eru húsa- og íbúðar prísir eisini vaksnir munandi í 2026 runt alt landið.[3]

Mynd 2
Sethúsaprisir, mió. kr., 2010 til 2025



Kelda: Hagstovan og Betri Banki.

Føroya Váðaráð sigur í sambandi við fund í ráðnum í september 2026, at sethúsaprísirnir eru í fleiri ár á rað øktir skjótari enn tøka inntøkan hjá húsarhaldunum, og at avmarkaða útboðið samanborið við stóra eftirspurningin eftir bústøðum er við til at trýsta prísirnar upp. Váðaráðið sigur eisini, at bústaðarprísirnir eru øktir í stórum pørtum av landinum í fyrra hálvári 2026 samanborið við miðalprísin í 2025.

Miðalprísurin var 7% hægri í fyrra hálvári 2026 fyri sethús í Tórshavn, samanborið við í 2025. Í størru bygdunum fall miðalprísurin við 4% í fyrra hálvári 2026, meðan hann í smærru bygdunum og í Suðuroy/Sandoy vaks við ávikavist 17% og 21%, samanborið við miðalprísin í 2025.[4]

Handilsvinnuni og øðrum privatum tænastuvinnum tørvar arbeiðsmegi. Sambært konjunkturbarometrinum siga 71% av fyritøkunum í byggivinnuni frá, at trot á arbeiðsmegi avmarkar møguleikarnar at økja framleiðsluna.

Útlánsvøksturin sæst í mynd 3 niðanfyri. Realkredittlán, sum føroysk húsarhald kunnu taka úr donskum realkredittfeløgum, vuksu nógv frá frá 2018 til 2022, men frá 2022 til 2025 minkaðu tey

[3] Kelda: Dagur og vika, 3. sept. 2026.
[4] Kelda: https://www.landsbankin.fo/fo-fo/fundur-i-foeroya-va%C3%B0ara%C3%B0i-21-september-2026.

støðugt aftur. Realkredittlánini minkaðu frá um 4 mia. kr. miðskeiðis í 2022 til um 3,3 mia. kr. miðskeiðis í 2025. Síðsta árið eru realkredittlánini til føroysk húsarhald minkað 1,7%.

Bruttoútlán frá føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum eru vaksin 9% síðsta árið. Ein orsøk til høga vøksturin í útlánum frá peningastovnunum til húsarhald er helst skjótt vaksandi bústaðarprísir. Útlán til vinnufeløg eru vaksin um 5% síðsta árið, sí mynd 3A.

Mynd 3

Inn- og útlán til húsarhald í Føroyum, føroyskir peningastovnar, mia. kr., sept.-2013 til juli-2026



* Nettoinnlán í mynd B er munurin millum inn- og útlán í mynd A.

Kelda: Hagstovan.

Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki høg, sammett við privata skuld í øðrum londum í vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá føroyskum húsarhaldum kann metast til um 50% av BTÚ í 2026. Bruttoskuldin hjá húsarhaldum í Danmark og Noregi er til dømis 85-90% av BTÚ, og í Íslandi er húsarhaldsskuldin um 70% av BTÚ.

Gongdin í útflutningsvinnunum

Mynd 4 vísir gongdina í tøkuni av aldum laksi síðstu árini. Á myndini sæst tøkan av alifiski í kruvdari vekt. Tøkan av alifiski er vaksin úr um 70 tús. tonsum í 2020 upp í væntað omanfyri 130 tús. tons í 2026. Prísirnir á aldum laksi lækkaðu sum kunnugt munandi í 2025 og eru ikki komnir aftur á støðið frá 2024. Ársmiðal prísurin sambært *Fish Pool* vísitalinum var omanfyri 8 EUR fyri kg. í 2024 og lækkaði síðani til um 6,7 EUR fyri kg. í 2025.

Síðstu tvey árini hava prísirnir á aldum laksi sambært *Fish Pool* vísitalinum verið toluliga støðugir á millum 6 og 7 EUR fyri kg., tó við vanligu sveiggjunum eftir árstíðini. Síðstu árini hevur prísurin á laksi verið munandi hægri frá umleið desember til út á várið, meðan prísirnir eru lækkaðir summarmánaðirnar. Síðstu vikurnar eru prísirnir tó hækkaðir nakað aftur (sí mynd 5). Flestu forsagnir og forward-prísir benda á, at prísirnir á laksi fara at hækka nakað seinni í 2026 og í 2027. Vøksturin síðstu árini í útflutningsvirðinum á alilaksi er komin av vaksandi nøgdum.

Miðalprísurin á útfluttum aldum laksi úr Føroyum er hækkaður úr um 31 kr. fyri kg. í 2012 upp í um 54 kr. fyri kg. í 12 mánaðarskeiðnum august 2025 til juli 2026. Havast skal í huga, at aðrir prísir og framleiðslukostnaðurin somuleiðis eru hækkaðir munandi hetta sama tíðarskeið.

Mynd 4

Tøka av aldum laksi í tús. tonsum, kruvd vekt, skift á ár, 1996 til 2026



Viðm.: Tøkan er í kruvdari vekt í tonsum.
Kelda: Hagstovan og metingar hjá Fíggjarmálaráðnum fyri 2026.

Nevnast kann eisini, at útlit eru til, at fóðurprísir fara at hækka munandi næstu 1-2 árini, sum kemur av krígnum í Ukraina, stongslinum av Hormussundinum og hækkandi olju- og orkuprísum. Harafturat kemur áðurnevnda *El Niño* veðurfyribrigdið, og at tað fer at ávirka veðurlagið um stóran partin av heiminum, órógva landbúnaðarframleiðsluna í landsynningsasia og Suðuramerika, undir hesum framleiðsluna av rávøru til fóður til alivinnuna.

Mynd 5

Fishpool vísitalið í EUR/kg., býtt á vikur, 2019 til viku 38 í 2026, forward prísir til ársenda 2027



Kelda: Fish Pool Index.

Gongdin í *Fish Pool* vísitalinum síðani 2019 er víst í mynd 5 omanfyri. Á myndini sæst stóra lækkingin í prísum í 2025. Eftirspurningurin eftir aldum laksi og øðrum dygdargóðum matvørum er vaksandi um tað mesta av heiminum, og millum annað tí verður mett, at útlit eru til, at altjóða laksaprísir kunnu hækka nakað aftur í 2026 og í 2027.

Gongdin í uppsjóvarvinnuni hevur verið ein orsøk til vøksturin í føroyska búskapinum síðstu um 10 árini. Nøgdirnar og kvoturnar eru vaksnar nógv, og prísirnir eru eisini hækkaðir. Síðstu tvey árini eru føroysku uppsjóvarkvoturnar tó minkaðar (tó ikki kvotan av norðhavssild). Viðvíkjandi kvotunum av makreli ásettu strandarlondini eina mest loyvdu veiðu á út við 300 tús. tons fyri 2026, hóast ráðgevingin frá ICES var um 174 tús. tons, sum var ein minking á um 70%, sammett við tilmælið fyri 2025.

Toskakvotan í Barentshavinum er minkað síðstu árini, meðan toskakvotan á Flemish Kap vaks um 20% í 2026. Toskakvotan á Flemish Kap minkar 18% ella 650 tons í 2027, men toskakvotan á Flemish Kap hevur tó avmarkaðan samfelagsbúskaparligan týdning. Felags norsk-russiska ráðgevandi arbeiðsbólkurin um fiskiskap í Barentshavinum hevur mælt til eina mest loyvdu veiðu fyri 2027 á 10% omanfyri mest loyvdu veiðuna fyri 2026.[5]

Føroyska toskakvotan í Barentshavinum er vanliga ein støðugur partur (lutfall) av russisku kvotuni í Barentshavinum, og útlit eru til, at føroyska kvotan eisini hækkar um 10% í 2027, sum norsku og russisku kvoturnar væntandi hækka.

Samlaða útflutningsvirðið á uppsjóvar- og botnfiski er tó vaksið munandi í 2026, orsakað av óvanliga góðum prísum, serliga á toski, hýsu og makreli. Fíggjarmálaráðið roknar við, at ískoytið til vøksturin frá útflutningsvinnunum verður støðugt ella hækkar nakað næstu 1-2 árini. Samanumtikið eru útlitini fyri prísgongdina góð, og roknað verður ikki við stórum niðurskurði í kvotum í 2027, tí kvoturnar eru longu minkaðar nógv síðani 2025.

Avreiddu nøgdirnar av botnfiski, fiskaður undir Føroyum, eru framvegis smáar, men raksturin í vinnuni er sjálvandi betraður munandi av góðu prísunum á toski og hýsu. Stovnsmetingar hjá Havstovuni vísa, at toskastovnurin á Landgrunninum hevur verið á lágum støði síðani 2004. Millum 2020 og 2024 var gýtingarstovnurin undir vandamarkinum, men kom í 2025 upp um markið, men gýtingarstovnurin er tó enn undir lágmarkinum.

Sambært tilmælinum frá ICES um toskastovnin á Landgrunninum er stovnurin komin upp um markið, har serlig verjutiltøk eru neyðug, men hann er tó enn undir fyrivarnismarkinum. Vøksturin í stovninum kemur serliga av betri tilgongd tey seinastu árini. Samanumtikið eru ikki góð útlit fyri, at avreiddu nøgdirnar ella fiskiskapurin í nøgdum eftir toski og hýsu á heimaleiðunum fara at vaksa munandi næstu 1-2 árini, hóast avreiðingarvirðið kann vaksa nakað av góðum prísum á toski og hýsu.

Gongdin á arbeiðsmarknaðinum

Arbeiðsmarknaðurin er sera væl fyri. Arbeiðsloysið hevur verið støðugt um 1% av arbeiðsmegini síðstu um fimm árini, og skrásetta arbeiðsloysið var 0,9% í august í ár. Føroyar hava sambært flestu uppgerðum lægsta arbeiðsloysi í Evropa. Tað lægsta arbeiðsloysið, sum er skrásett í Føroyum, var 0,6% á sumri 2023. Talið av starvsfólkum í innlendska búskapinum er hækkað úr um 28 tús. í 2021 upp í um 30 tús. miðskeiðis í 2026.

[5] Kelda: https://sjomatnorge.no/kvoterad-for-bestandene-i-barentshavet-krevende-og-forventet/?utm.

Á mynd 6 niðanfyri sæst gongdin í arbeiðsloysinum og í talinum av starvsfólkum í innlendska búskapinum. Arbeiðsloysið er lágt í øllum landinum, tó at arbeiðsloysið er nakað hægri í Suðuroy (1,9%) enn aðrastaðni í landinum.

Síðsta árið er talið av starvsfólkum vaksið bæði av útlendingum, sum eru komnir til Føroyar at arbeiða, og av donskum ríkisborgarum. Danskir ríkisborgarar, sum flyta til Føroyar, eru sannlíkt fyri tað mesta føroyingar. Mett verður, at umleið 2.600 útlendingar starvast í Føroyum, grundað á talið av starvsfólkum á arbeiðsmarknaðinum, sum ikki hava danskan ríkisborgaraskap.

Mynd 6
Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld og løntakarar, jan.-2010 til aug.-2026



Kelda: Hagstovan.

Talið av starvsfólkum uttan bústaðartilknýti sbrt. uppgerð frá Hagstovu Føroya var um 1.000 fólk miðskeiðis í 2019. Síðani er talið vaksið til um 2.200 fólk miðskeiðis í 2026. Fyri at hava bústaðartilknýti skulu fólk hava búð helvtina av lívinum ella 7 út av 10 samanhangandi árum í Føroyum eina ferð í lívinum.

Útlendsku starvsfólkini forða fyri størri lønartrýsti og fyri størri fløskuhálsum á arbeiðsmarknaðinum, serliga innan handverks- og tænastuvinnuna. Útlendsku starvsfólkini eru í løtuni um 7% av samlaðu starvsfólkunum í landinum. Til sammetingar eru útlendsku løntakararnir í Danmark og Íslandi ávikavist um 15 og 20% av øllum løntakarunum. Í USA, Bretlandi og Týsklandi eru útlendsku løntakararnir somuleiðis út við 20% av samlaðu løntakarunum.

Nógv bendir á, at gongdin við fleiri útlendskum løntakarum í Føroyum fer at halda fram næstu árini, millum annað orsakað av stórum tørvi á arbeiðsmegi innan ávísar vinnur. Sostatt bendir nógv á, at tørvurin á arbeiðsmegi í Føroyum og í øðrum framkomnum londum er bygnaðarligur og fer at halda fram næstu nógvu árini.

Vinnutíttleikin er sera stórur í Føroyum, samanborið við í øðrum londum. Vinnutíttleikin er arbeiðsfjøldin í % av fólkinum. Vinnutíttleikin í aldursbólkinum 15-74 ár er um 84% tilsamans fyri kvinnur og menn, sum er hægsti vinnutíttleiki í Europa.

Lønargjaldingar í Føroyum hækka í løtuni út við 7% árliga. Lønargjaldingar tilsamans og í ymiskum høvuðsvinnugreinum síggjast eisini í mynd 7. Síðani 2010 hevur størsti vøksturin í lønargjaldingum verið í fiskiveiðu, aling og byggivinnuni. Síðsta árið eru lønargjaldingarnar serliga vaksnar innan botnfiskiveiðu, flutnings- og goymsluvinnu og ymiskum øðrum tænastuvinnum.

Mynd 7

Lønargjaldingar, trendur, býttar á mánaðr, jan. 2010 til aug. 2026



Viðm.: Mynd A vísir lønargjaldingar, trendin, tilsamans jan. 2010 til aug. 2026.
Mynd B vísir lønargjaldingar, trendin, í fýra høvuðsvinnugreinum jan. 2010 til aug. 2026. Vísital jan. 2010 = 100.
Kelda: Hagstovan.

Eftirspurningur og húsarhaldsnýtsla

Flestu hagtøl og lyklatøl yvir innlendis nýtslu benda á, at privati eftirspurningurin er vaksin síðsta árið og at meira ferð nú er komin á innlendis nýtsluna sammett við árini 2022 til 2024. Orsakirnar eru helst, at prísvøksturin, sum tók dik á seg í 2022, er lækkaður aftur, realløntir eru hækkaðar síðani árini 2022 til 2024 og rentustøði er lækkað.

Mynd 8

Smásøla í føstum prísum, býtt á vørubólkar og ársfjórðingar (trendur), 2005 til 2026



Kelda: Hagstovan.

Útlit eru til, at realinntøkan hjá flestu húsarhaldum fer at hækka næstu 1-2 árini. Skattaumleggingin árini 2024 og 2025 og leigustuðulin frá september í 2026 hava eisini givið húsarhaldum hægri tøka inntøku. Lága skuldin millum føroysk húsarhald talar eisini fyri, at húsarhaldsnýtslan kann vaksa næstu 1-2 árini. Samanumtikið talar nógv fyri, at privata nýtslan kann vaksa hóvliga næstu 1-2 árini.

Prísvøksturin er vaksin aftur síðsta hálva árið. Roknast kann við, at prísvøksturin verður millum 2 og 3% næstu næstu 1-2 árini. Um óvissa støðan í Miðeystri við stongsli av Hormussundinum dregur út, versnar ella spjaðir seg til fleiri lond við størri ávirkanum á altjóða olju- og orkumarknaðin, er tó eisini vandi fyri munandi størri prísvøkstri næstu 1-2 árini. Áðurnevnda *El Niño* veðurfyribrigdi kann eisini geva hægri prísvøkstur á matvørum næstu 1-2 árini.

Á mynd 8 sæst vísital fyri smásølu í føstum prísum fyri ymiskar vørubólkar. Myndin vísir, at privati eftirspurningurin vaks lítið árini 2022 til 2025, men at eftirspurningurin síðani er vaksin aftur síðsta árið. Viðvíkjandi gerandisvørum og øðrum ódrúgvum vørum er eftirspurningurin tó ikki vaksin nógv síðstu árini. Smásøla er søla hjá handlum til privata nýtslu og lýsir gongdina í umsetninginum og broytingarnar í seldum mongdum.

Mynd 9

Brúkaraprístalið, 1. ársfjórðing 2001 til 3. ársfjórðing 2026, býtt á ársfjórðingar, vísital 2001 = 100



Kelda: Hagstovan.

Sambært brúkaraprístalinum hjá Hagstovuni var prísvøksturin 2,5% frá august 2025 til august 2026. Prísvøksturin á ávísum matvørum er framvegis stórur, til dømis á kjøtvørum av ymiskum slagi. Prísurin á grønmeti er lækkaður síðsta árið, sum kemur av, at meirvirðisgjald ikki longur verður lagt á hesar vørur. Nevnast kann, at broytingarnar frítøkurnar í meirvirðisgjaldinum í 2026 órógva samlaðu myndina, sum brúkaraprístalið gevur av *veruliga* prísvøkstrinum í búskapinum.

At grønmeti er frítikið meirvirðisgjald og at bensin- og diesel varð frítikið meirvirðisgjald í eitt tíðarskeið í ár sæst aftur í brúkaraprístalinum, men veruligi prísvøksturin í búskapinum minkar kortini ikki av broytingunum í meirvirðisgjaldinum, sum bara hava eina ávirkan eina ferð. At kalla allar nýtsluvørur í Føroyum eru innfluttar, og prísvøksturin á gerandis-, matvørum og øðrum vørum er tí eisini í stóran mun innfluttur úr øðrum londum.

Brúkaraprístalið hækkaði ógvusliga í 2022, sum í stóran mun kom av krígnum í Ukraina og harav hækkandi olju- og matvøruprísum, sí mynd 9. At prísvøksturin nú hækkar aftur, kemur í stóran mun av, at prísirnir á orku og brennievni eru hækkaðir. Í Evropa og USA verður roknað við prísvøkstri í miðal á millum 2 og 3% í 2026 og í 2027.

Konjunkturvísitalið er víst í mynd 10. Konjunkturvísitalið er lækkað úr 11 í januar 2026 til 5 í síðstu kanning, sum var í juni 2026. Brúkarakanningin vísir, at føroysk húsarhald eru ávirkað av gongdini síðani 2022 við kríggi í Evropa, stórum prísvøkstri, ófriði í Miðeystri og rentuhækkingum frá 2022 til 2024.

Húsarhaldini meta sum heild, at búskaparstøðan í Føroyum og teirra fíggjarstøða fara at versna nakað næstu 12 mánaðirnar. Konjunkturkanningin vísir eisini, at ein meiriluti av fyritøkunum í handilsvinnuni væntar størri sølu næsta árið. Handilsvinnan sigur eisini, at sølan síðsta árið er vaksin.

Mynd 10

Samanvigað konjunkturvísital og vísital fyri húsarhald, jan.-2006 til jun.-2026



Kelda: Hagstovan.

Gongdin í fólkatalinum

Hagtølini í sambandi við fólkatal og -flytingar stava frá Hagstovuni og landsfólkayvirlitinum. Fólkatalið fevnir um øll, sum eru skrásett at búgva fast í landinum, undir hesum eisini tilflytarar, sum flyta til landið at arbeiða og fáa fastan bústað her í tí sambandi. Fólkatalið í Føroyum frá 1985 til 2026 og meting til januar 2027 sæst í mynd 11.

Mynd 11
Fólkatal í Føroyum 1. januar, 1985-2026, meting fyri 2027



Kelda: Hagstovan.

Fólkatalið veksur í løtuni um 1,4% um árið, sum svarar til út við 800 fólk. Síðsta árið er vøksturin í fólkatalið tvífaldaður. Síðsta árið eru bæði fráflytingin minkað, tilflytingin er vaksin, og burðaravlopið er hækkað.

Mynd 12
Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2026



Viðm.: Tølini fyri árið 2026 eru metingar grundaðar á jan.-juli 2026.
Kelda: Hagstovan.

Hagtølini yvir ríkisborgaraskap hjá persónum í Føroyum og sokallað bústaðartilknýti benda á, at síðsta árið er tilflytingin javnt býtt millum føroyingar, sum flyta til landið, og útlendska arbeiðsmegi, sum flytur til landið. Í 2025 fluttu um 270 fólk við bústaðartilknýti úr Føroyum netto, og um 450 fólk uttan bústaðartilknýti fluttu til landið netto. 12 mánaðarskeiðið august 2025 til juli 2026 er fráflytingin, netto, av fólki við bústaðartilknýti lækkað til um 160 fólk, og tilflytingin, netto, av fólki við bústaðartilknýti er vaksin til um 720 fólk.

Samlaða tilflytingin netto síðani 2014 er tekin um stóra framgongd á arbeiðsmarknaðinum og í búskapinum yvirhøvur. Síðstu áratíggjuni hava broytingar í fólkaflytingini til og úr landinum samsvarað væl við umstøðurnar á arbeiðsmarknaðinum og í búskapinum sum heild.

Hagtøl yvir flytingina millum Føroyar og útlond vísa, at í 2025 komu um 53% av tilflytarunum til Føroyar úr Danmark. Um 9% komu úr øðrum Norðurlondum, um 19% komu úr øðrum londum í Evropa, og um 13% komu úr Asia. Tað bendir á, at í minsta lagi helmingurin av tilflytingini til Føroyar í 2025 vóru føroyingar, sum fluttu til Føroyar úr Danmark og úr øðrum londum. Hagtøl higartil í 2026 benda á, at hesin parturin av tilflytingini er vaksin í 2026.

Fólkatalið er vaksið síðani 2014 og næsrkast nú 56 tús. Fólkavøksturin er vaksin munandi síðsta hálva árið, og er nú eins stórur lutfalsliga og árini um aldaskiftið og í 2019, tá ið fólkavøksturin annars setti met. Mynd 12 vísir árligu broytingarnar í fólkatalinum síðani 1970 við mettum tølum fyri 2026, og mynd 13 vísir nettoflyting til landið býtt á mánaðir.

Mynd 13

Fráflyting og tilflyting til Føroyar og nettoflyting*, jan.-2007 til juli-2026



* Strikan við nettoflyting vísir nettoflyting samanlagt fyri síðstu 12 mánaðirnar fyri hvønn mánaða.
Kelda: Hagstovan.

Fólkavøksturin, sum hevur verið síðani 2014, hevur ikki verið javnt býttur um alt landið. Fólkatalið á Sandoynni er vaksið síðstu trý árini, meðan tað hevur staðið í stað ella er minkað í Suðuroynni. Síðstu árini hevur at kalla allur fólkavøksturin hevur verið aðrastaðni í landinum. Størsti parturin av fólkavøkstrinum er í miðøkinum í landinum, sum sæst í talvu 1.

Talva 1

Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. aug. 2025 til 1. aug. 2026

Øki í landinum	Fólkatal 1. aug. 2025	Burðaravlop	Nettoflyting	Fólkatal 1. aug. 2026	Broyting í tali	Broyting í %
Norðoya økið	6.472	13	104	6.548	76	1,2
Eysturoyar økið	12.692	68	158	13.007	315	2,5
Streymoyar økið, suður	22.479	112	243	22.819	340	1,5
Streymoyar økið, norður	4.007	17	6	4.017	10	0,3
Vága økið	3.447	17	12	3.466	19	0,6
Sandoyar økið	1.331	6	26	1.367	36	2,7
Suðuroyar økið	4.529	-27	14	4.502	-27	-0,6
Alt landið	**54.957**	**206**	**563**	**55.726**	**769**	**1,4**

Kelda: Hagstovan.

Viðurskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni

Á mynd 14 sæst gongdin í føroyska inn- og útflutninginum síðan 1988 við mettum tølum fyri 2026. Myndin vísir, at innflutningurin er nógv ávirkaður av búskaparligu sveiggjunum í samfelagnum og serliga av innlendis eftirspurninginum. Harafturat ávirka oljuprísir innflutningin. Stórur innflutningur av skipum og flogførum ella stórar íløgur okkurt árið kunnu eisini ávirka innflutningin.

Mynd 14

Inn- og útflutningur, mia. kr., 1988 til 2026



Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki íroknaðar handilsjavnan. Metingin fyri 2026 byggir á tíðarbilið januar-juli 2026 sammett við somu mánaðir í 2025.
Kelda: Hagstovan.

Hagtøl yvir innflutning higartil í ár benda á, at innflutningurin kann vaksa um 9% í ár, sammett við í 2025. Størstu orsakirnar eru størri tøka av alilaksi og góðir prísir á toski og hýsu. Útflutningurin er vaksin støðugt síðstu árini, tó at hann minkaði nakað í 2024. Vøruútflutningurin er vaksin úr um 10 mia. kr. í 2021 í mettar út við 15 mia. kr. í 2026.

Síðstu nógvu árini hava avlop verið á føroyska gjaldsjavnanum, sí mynd 15. Uppgerðir av gjaldsjavnanum eru tøkar til 2024. Við støði í handilsjavnanum fyri 2025 ber til at meta leysliga um gjaldsjavnan, hóast metingarnar eru óvissar og skulu lesast við fyrivarni. Hagtølini benda á, at stór avlop hava verið á gjaldsjavnanum síðani 2013. Heldur verandi gongd fram, vera eisini stór avlop í 2025 og 2026.

Avlopini á gjaldsjavnanum síðani 2013 eru í stóran mun komin av, at býtislutfallið í uttanríkishandlinum er betrað. Hetta merkir, at prísir á útfluttum vørum (til dømis á aldum laksi, botnfiski og uppsjóvarfiski) eru hækkaðir meiri í miðal, sammett við prísirnir á innfluttum vørum (til dømis á brennievni og á innfluttum nýtsluvørum). Í 2025 og 2026 eru laksaprísir tó lækkaðir, og prísirnir á brennievni eru hækkaðir munandi. Harafturat eru prísirnir hækkaðir á uppsjóvarfiski og á botnfiski.

Mynd 15
Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2026



* Tølini fyri 2025 og 2026 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

Heimsbúskapurin

Vøksturin í heimsbúskapinum er minkaður í ár, men búskapirnir í Evropa og USA hava víst seg at vera mótstøðuførir, hóast áhaldandi ófrið í Miðeystri, stongsul av Hormussundinum, høgar olju- og orkuprísir og kríggj í Ukraina.

Í talvu 2 niðanfyri síggjast metingar frá OECD og danska Tjóðbankanum um væntaða vøksturin í ymiskum økjum og londum í 2026 og 2027. Í talvuni sæst, at roknast kann við vøkstri á millum 1 og 2% í 2026 og 2027 í flestu av stóru marknaðunum fyri føroyskan útflutning. Vøksturin í USA og í heimshandlinum kemur millum annað av stórum íløgum í tøkni, vitlíki og av avleiddum virksemi av tí.

Talva 2
Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2023-2027 býtt á lond og øki

*% um árið í føstum prísum**	2023	2024	2025	2026	2027
USA	2,9	2,8	2,1	2,2	2,1
Evruøkið	0,4	1,0	1,3	1,0	1,0
Týskland	-0,9	-0,5	0,3	1,1	1,1
Bretland	0,3	1,0	1,3	1,1	1,1
Danmark	0,6	2,5	3,5	4,0	2,3
Heimsbúskapurin	3,3	3,5	3,4	2,9	3,0

*Uppgerðirnar eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Nationalbanken, Udsigter for dansk økonomi, 23. sept. 2026, og OECD Economic Outlook, Interim Report, sept. 2026.

Útlit eru til vøkstur í heimsbúskapinum næstu 1-2 árini, men útlitini eru versnað og eru meira óviss orsakað av støðuni í Miðeystri og av avleiðingunum fyri altjóða olju- og orkumarknaðin, prísvøkstur og rentuhækkingar frameftir. Metingar hjá OECD og IMF benda á, at búskaparvøksturin í Evropa verður um 1% í 2026 og í 2026. Roknað verður ikki við stórum vøkstri í privatu nýtsluni orsakað av hægri prísvøkstri og hækkandi rentum.

Altjóða oljumarknaðurin er framvegis órógvaður av avmarkaðu ferðsluni gjøgnum Hormussundið, sum hevur havt við sær stórar príshækkingar á olju og orku. Í løtuni er sannlíkt, at olju- og orkuprísir vera verandi høgir í øllum førum fram til ársenda 2027. Til dømis eru forward-prísir á veiting av Brent-ráolju við ársenda 2027 framvegis um 80 USD fyri fatið.

Høgur olju- og orkuprísirnir síðstu mánaðirnar hevur eisini havt við sær hægri prísvøkstur í Evropa og í USA. Hetta hevur síðani gjørt, at altjóða rentustøðið er hækkað síðstu mánaðirnar. Miðbankar í Evropa og í USA hava hækkað leiðandi renturnar, og roknast kann eisini við smærri rentuhækkingum næsta hálva árið (mynd 16).

Stórar almennar íløgur verða næstu árini gjørdar í verju, trygd, tilbúgving, undirstøðukervið og grøna orkuskiftið í Evropa, sum stimbra búskapirnar. Roknað verður við, at prísvøksturin, høgir olju- og orkuprísir og rentuhækkingar, sum frálíður, fara at tálma privata eftirspurninginum í Evropa og USA.

Búskaparvøksturin í USA er minkaður í 2025 og í ár millum annað orsakað av lakari húsarhaldsnýtslu og lægri reallønarvøkstri. Vøksturin í USA er í stóran mun drivin av stórum íløgum í tøknigeiranum og í vitlíki. Roknað verður nú við nakað lægri búskaparvøkstri í USA næstu 1-2 sammett við fyri ári síðani.

Fíggjarpolitikkurin í USA væntast harafturat ikki í sama mun at stimbra búskaparvøksturin næstu 1-2 árini eins og undanfarin ár. Hetta kemur millum annað av stórari almennari skuld í USA og av

at tekin eru um, at fíggjarmarknaðirnir ikki eru eins tryggir við lánførið hjá stjórnini í USA, og at rentustøðið á skuldini hjá stjórnini í USA tí er hækkað munandi síðstu vikurnar.

Prísvøksturin í USA hevur tikið dik á seg síðsta hálva árið og er nú um 3,5% árliga, sum er væl omanfyri málið hjá miðbankanum á 2% um árið. Roknast kann við, at høgu olju- og orkuprísirnir og skiftandi fráboðanir um tollhækkingar fara at stimbra brúkaraprísir í USA næstu tíðina.

Prísvøksturin í Evropa er eisini hækkaður síðsta hálva árið til um 3,2% um árið. Arbeiðsloysið í evruøkinum hevur verið støðugt á um 6% síðani 2022. Roknað verður við støðugum arbeiðsloysi í Evropa næstu 1-2 árini. Nakað av muni er framvegis á arbeiðsloysinum í Evropa, tó at munurin er minni nú enn fyri nøkrum árum síðani.

Mynd 16 vísir leiðandi renturnar í Evropa og USA síðani ársbyrjan 2022 og rentuforsagnir til ársenda 2027. Flestu forsagnir um rentu siga, at miðbankin í USA sannlíkt fer at hækka renturnar nakrar ferðir seinni í 2026 og aftur í 2027. Sannlíkt verður talan um smáar rentuhækkingar. Hóast rentustøðið er nakað hækkað, er rentustøðið samanumtikið ikki høgt, um hugt verður eftir miðalrentum síðstu um 70 árini.

Mynd 16
Leiðandi rentur, býtt á lond, øki og ársfjórðingar, 2022-2026, rentuforsøgn til okt. 2027



Kelda: OECD Economic Outlook, Interim Report, 23. september 2026.

Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt at gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og tí almenna sum heild síðstu árini. Hugt verður eisini stutt eftir skuldarstøðuni hjá landinum. Mynd 17 vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og RLÚ-úrslit síðani 2005 við mettum tølum fyri 2026 og tølum úr uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2027. Á myndini sæst, at landið væntandi hevur hall í 2026 á um 63 mió. kr. Í 2025 hevði landskassin avlop á um 11 mió. kr.

Mynd 17

Úrslit landskassans, mió. kr., 2005 til 2027



Viðm.: Tølini fram til og við 2025 eru roknskapartøl. Tølini fyri 2026 og 2027 eru mett tøl og úr uppskotinum til fíggjarlóg.
Kelda: Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið.

Úrslitið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2027 er eitt avlop á 13,5 mió. kr., íroknað 25 mió. kr. til at hækka upphæddina, áðrenn mótroknað verður í fólkapensjónini av arbeiðsinntøku úr 61.900 kr. til 300 tús. kr. frá 1. juli 2027. Á mynd 17 sæst, at útreiðslurnar hava verið meira støðugt hækkandi síðani 2005, meðan inntøkurnar eru vaksnar meira óstøðugt.

Inntøkurnar hjá landinum fylgja í størri mun sveiggjunum í búskapinum, meðan útreiðslurnar vaksa meira javnt og óheft at gongdini í búskapinum annars. Fíggjarmálaráðið ger vart við, at vøksturin í rakstrarútreiðslunum kann ikki vera munandi størri enn vøksturin í inntøkunum í longri tíð, uttan at tað ávirkar kredittvirðið hjá landinum og møguleikarnar og rásarúmið at reka sjálvstøðugan fíggjarpolitikk.

Mynd 18 vísir langfreistaðu skuld landskassans, íroknað skuldina hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar síðani 2017, og innistandandi hjá landsstýrinum í Landsbankanum (gjaldførið). Lánsbrævaskuldin hjá landinum var um 5 mia. kr. miðskeiðis í 2026.

Landskassin hevur lítla skuld, sammett við flestu onnur lond í vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum kann metast til um 16% av BTÚ í 2026. Harafturat hava kommunurnar um 2 mia. kr. í bruttoskuld, sum svarar til um 6% av BTÚ í 2025. Almenna felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar

hevur skuld á um 7% av BTÚ. Felagið hevur í 2026 ikki brúkt av ferðsluveðhaldinum frá landinum, men landið stuðlar felagnum við rakstrarstuðli á 10 mió. kr. í 2026.

Mynd 18

Langfreistaða skuld landskassans* og innistandandi í Landsbankanum, mió. kr., 1997 til 2026



* Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina síðani 2017.
Kelda: Landsbankin og Gjaldstovan.

Sambært leiðreglum fyri uppgerð av almennari skuld í londunum í ES (EGS-skuld) og sambært Landsbankanum verður skuldin hjá P/F Eystur- og Sandoyartunlar roknað sum almenn skuld, tí landið veðheldur fyri skuldina og stuðlar felagnum við rakstrarstuðli. Íroknað skuldina hjá tunnilsfelagnum kann almenna bruttoskuldin metast til um 30% av BTÚ í 2026.

Almenna bruttoskuldin í londunum í ES er um 90% av BTÚ í miðal, meðan hon er 25-30% av BTÚ í Danmark og um 50-55% av BTÚ í Íslandi. Her eigur at verða nevnt, at smá lond, har stór sveiggj kunnu vera í búskapinum, eru meira viðbrekin og hava tí ikki sama rásarúm sum størri lond til at hava nógva skuld í prosent av BTÚ.

Mynd 19

Nettoskuld landskassans* (langfreistað skuld frádrigið gjaldføri), mió. kr., 1997 til 2026



* Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina síðani 2017.
Kelda: Landsbankin og Gjaldstovan.

Mynd 19 vísir nettoskuldina hjá landskassanum síðani 1997 íroknað skuldina hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar frá 2017. Nettoskuldin er í hesum føri uppgjørd sum langfreistað skuld, frádrigið gjaldføri hjá landinum. Á myndini sæst, at nettoskuldin hjá landinum er minkað síðani 2017. Hækkingin í 2017 kom av lántøkuni hjá tunnilsfelagnum. Hækkingin í 2020 kom av láninum, sum var tikið í tíðini við korona, og hækkingin í 2024 kom av láninum, sum varð tikið tá og bleiv brúkt lutvíst til at rinda lán aftur í 2025.

Landið hevur sera gott kredittvirði

Kredittmetingarfyrtøkan Moody's dagførdi sína skuldarmeting (rating) av lánførinum hjá landsstýrinum í september 2026. Samlaða metingin frá Moody's av landsstýrinum er óbroytt aa2 við støðugum útlitum fyri metingina. Skuldarmetingin aa2 er triðhægsta meting, sum Moody's letur. Til sammetingar er Írland eitt annað land á okkara leiðum, sum hevur hesa somu skuldarmetingina.

Lánsbrævaskuldin er miðskeiðis í 2026 um 5 mia. kr. umframt skuldina hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar á um 2,2 mia. kr. Miðalgjaldførið hjá landinum higartil í ár er um 4,9 mia. kr.

Roknast kann við smáum rentuhækkingum næsta árið, og tí fara rentuútreiðslurnar brutto hjá landinum helst at vaksa nakað næstu 1-2 árini, tí skuld verður endurfíggjað til hægri rentu. Tó skulu eingi lánsbrøv hjá landinum endurfíggjast í 2027, og hægri rentuútreiðslur fara tí væntandi ikki at síggjast fyrr enn frá 2028.

Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2027

Talvan niðanfyri vísir inntøkur, útreiðslur og RLÚ-úrslitið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2027. Í talvuni niðanfyri eru nettorenturnar íroknaðar á inntøkusíðuni, og løgujáttanir eru íroknaðar útreiðslunum tilsamans.

Høvuðstøl í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2027

Mió. kr.	**2027**
Inntøkur tilsamans	8.077
Útreiðslur tilsamans *	8.063
RLÚ-úrslit	**14**

** Íroknað 25 mió. kr. til at hækka upphæddina áðrenn mótroknað verður í fólkapensjónini av arbeiðsinntøku úr 61.900 kr. til 300 tús. kr. frá 1. juli 2027*

Framrokningar av inntøkum og útreiðslum

Stóru inntøkukeldurnar, vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, verða í fyritreytunum settar at vaksa varisliga um 4% í 2027. Eftir hetta er framroknað við mettum vøkstri í føstum prísum.

Inntøkur landskassans í 2027

Inntøkurnar eru mettar til 8.077 mió. kr. netto í 2027. Hetta er íroknað mettar rentuútreiðslur á um 151 mió. kr. brutto og rentuinntøkur á um 163 mió. kr. brutto. Talvan niðanfyri vísir inntøkurnar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2027.

Meting av inntøkum landskassans í 2026 og 2027

mió. kr.	**R-2025**	**FL-2026**	**Meting 2026**	**FLU-2027**	**Munur frá FL26 til FLU-27**
Rentur	-21	-22	-12	12	154,6%
Skattainntøkur	3.462	3.371	3.544	3.767	11,7%
Avgjøld og tollur	3.727	3.862	3.904	4.045	4,7%
Ymsar inntøkur	171	166	138	128	-22,9%
Flytingar	-407	-418	-412	-417	0,2%
Heildarveiting o.t.	567	542	542	542	0,0%
Tilsamans	**7.500**	**7.501**	**7.704**	**8.077**	**7,7%**

Útreiðslur landskassans í 2027

Útreiðslurnar verða mettar til 8.062 mió. kr. í 2027. Harav eru rakstrarútreiðslurnar 7.482 mió. kr., og løgur og løgukendar útreiðslur eru 581 mió. kr.

Talvurnar niðanfyri vísa útreiðslurnar hjá landskassanum útgreinaðar á rakstur og løgur.

Meting av útreiðslum landskassans í 2026 og 2027

mió. kr.	R-2025	FL-2026	Meting 2026	FLU-2027	Munur frá FL26 til FLU-27
Rakstur	6.824	7.153	7.182	7.483	4,6%
Løgur og løgukendar útr.	664	616	585	581	-5,7%
Tilsamans	**7.488**	**7.769**	**7.767**	**8.063**	**3,8%**

Útreiðslur landskassans, býtt á játtanarsløg, 2025 til 2027

mió. kr.	R-2025	FL-2026	FLU-2027	Munur frá FL26 til FLU-27
Rakstrarjáttan	4.539	4.736	4.933	4,2%
Lógarbundin játtan	1.976	2.081	2.236	7,4%
Stuðulsjáttan	454	455	433	-4,8%
Løgujáttan	519	497	461	-7,2%
Tilsamans	**7.488**	**7.769**	**8.063**	**3,8%**

Løgur og løgukendar útr.	664	616	581	-5,7%

Løgur í 2027

Løgukarmurin í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2027 er 581 mió. kr., íroknað løgukendar útreiðslur (stuðul til løgur) á um 119 mió. kr. Óbrúktar løgujáttanir eru eisini frá 2026, sum hava átekning soleiðis, at til ber at framflyta tær til fíggjarárið 2027. Roknast kann við, at um 350 mió. kr. av óbrúktum løgujáttanum verða fluttar til fíggjarárið 2027.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu løgukarmurin á 581 mió. kr. í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2027 eru býttar á greinar og løgur.

Løguætlanin fyri 2027 ***(tús. kr.)***	
Løgur § 1. - § 12. Tilsamans	**580.590**
§ 1. Løgtingið	**0**
§ 2. Løgmansfyrisitingin	**3.000**
Umbygging í Tinganesi	3.000
§ 3. Fíggjarmál	**53.500**
Talgildu Føroyar	23.000
Vitlíki	5.000
Umvælingar, fíggjarmál	1.000
Búskaparskipanir landsins	2.000
Nýggj skattaskipan	22.500
§ 5. Uttanríkis- og fiskivinnumál	**11.000**
Umvælingar, fiskivinnumál	2.000
Nýtt vaktarskip	4.000
Tilbúgvingarætlan	5.000
§ 6. Vinnumál	**200.400**
Almennir bygningar, søla	-6.000
Umvælingar, vinnumál	4.000
Landsins ognir	3.000
Nýggir landsvegir	74.900
Strandfaraskip landsins	20.000
Havnir	4.500
P/F Suðuroyartunnil (stuðulsj.)	100.000

framhald...

...framhald

§ 7. Mentamál	**122.790**
Umvælingar, mentamál	20.000
Miðnám á Kambsdali	4.700
Skúladepil við Marknagil	8.000
Fróðskaparsetur Føroya	66.000
Varðveiting av mentanararvinum	3.000
Listasavn Føroya	6.500
Stuðul til kirkjubygging (stuðulsj.)	6.040
Ítróttaháskúlin í Suðuroy, løgustuðul (stuðulsj.)	3.550
Sjósavn, løgustuðul (stuðulsj.)	5.000

§ 11. Heilsu- og orkumál	**95.900**
Umvælingar, heilsumál	26.500
Nýggj talgild heilsuskipan	30.000
Medicoteknisk tól	10.300
Klaksvíkar sjúkrahús	24.400
Tól og útgerð til heilsutænastur í nærumhvørvinum, løgustuðul (stuðulsj.)	1.700
Landstreymsverkætlanir, løgustuðul (stuðulsj.)	3.000

§ 12. Almanna- og bústaðamál	**94.000**
Umvælingar, almannamál	7.000
Almannaverkið, KT-skipan	3.000
Bústovnar o.a.	84.000

Løgur §1 - §12 tilsamans	**580.590**

Yvirlit yvir løgukendar útreiðslur í 2027 *(túsund kr.)*	
Stuðul til kirkjubygging	6.040
Tól og útgerð til heilsutænastur í nærumhvørvinum	1.700
Ítróttaháskúlin í Suðuroy	3.550
Sjósavn	5.000
Landstreymsverkætlanir	3.000
P/F Suðuroyartunnil	100.000
Tilsamans	**119.290**

Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2026

Í játtanarskipanini er ásett, at saman við fíggjarlógaruppskotinum skal greiðast frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum. Her verður greitt frá játtanarligu støðuni samanlagt og fyri hvørja grein sær. Eisini verður víst yvirlit yvir, hvørjar játtanir (høvuðskontur) verða mettar at fara at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið fíggjarárið er farið. Her verða bæði tiknar við eykajáttanir, umbidnar játtanir og játtanir, har ið mett er, at frávik verður, tá ið fíggjarárið er av.

Meting av úrsliti landskassans í 2026 sammett við fíggjarlógina fyri 2026

1.000 kr.	FL-2026	Meting 2026	Frávik	Frávik (%)
Inntøkur	**7.500.650**	**7.703.595**	**202.945**	**2,7%**
Rakstrarútreiðslur	7.152.444	7.182.000	29.556	0,4%
Løgur	497.300	463.170	-34.130	-6,9%
Løgukendar útr.	118.800	121.400	2.600	2,2%
Útreiðslur tilsamans	**7.768.544**	**7.766.570**	**-1.974**	**0,0%**
RLÚ-úrslit	**-267.894**	**-62.975**	**204.919**	**76,5%**

Í talvuni omanfyri er víst RLÚ-úrslit fyri greinarnar 1 til 20 (vanligir postar). Fyri 2026 verður roknað við, at úrslitið (RLÚ-1) verður eitt hall á um 63 mió. kr.

Rakstrarútreiðslurnar verða væntandi um 30 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarlógini. Inntøkurnar verða væntandi um 203 mió. kr. hægri enn mettu inntøkurnar í fíggjarlógini. Løgu- og løgukendar útreiðslur verða væntandi um 32 mió. kr. lægri enn mett í fíggjarlógini.

Meting av inntøkum landskassans í 2026 sammett við fíggjarlógina eftir virksemisøki

1.000 kr.	R-2025	FL-2026	Meting 2026	Frávik	Frávik (%)
Rentur av skuld	-138.500	-156.100	-156.100	0	0,0%
Rentuinntøkur o.tíl.	117.498	134.200	144.145	9.945	7,4%
Skattainntøkur	3.462.042	3.370.650	3.543.650	173.000	5,1%
Avgjøld og tollur	3.727.333	3.862.000	3.904.000	42.000	1,1%
Ymsar inntøkur	171.407	166.100	138.100	-28.000	-16,9%
Flytingar	-406.875	-418.000	-412.000	6.000	1,4%
Heildarveiting o.t.	566.800	541.800	541.800	0	0%
Tilsamans	**7.499.704**	**7.500.650**	**7.703.595**	**202.945**	**2,7%**

Meting av útreiðslum landskassans* í 2026 sammett við fíggjarlógina eftir grein

1.000 kr.		FL-2026	Meting 2026	Frávik	Frávik (%)
§ 1	Løgtingið	131.049	121.149	-9.900	-7,6%
§ 2	Løgmansfyrisitingin	69.614	71.662	2.048	2,9%
§ 3	Fíggjarmál	510.284	519.451	9.167	1,8%
§ 5	Uttanríkis- og fiskivinnumál	282.589	286.264	3.675	1,3%
§ 6	Vinnumál	708.780	716.499	7.719	1,1%
§ 7	Mentamál	1.797.689	1.763.009	-34.680	-1,9%
§ 11	Heilsu- og orkumál	1.901.908	1.912.251	10.343	0,5%
§ 12	Almanna- og bústaðamál	2.366.631	2.376.285	9.654	0,4%
	Útreiðslur tilsamans	**7.768.544**	**7.766.570**	**-1.974**	**0,0%**
§ 20	**Inntøkur**	**7.500.650**	**7.703.595**	**202.945**	**2,7%**
	RLÚ-úrslit	**-267.894**	**-62.975**	**204.919**	

* Í talvuni eru vístar rakstrarjáttanir, løgujáttanir, lógarbundnar játtanir og stuðulsjáttanir tilsamans.

Rakstrarjáttanareftirlit

Niðanfyri verður hugt nærri eftir, hvussu játtanarliga støðan er á rakstrarjáttanum, stuðulsjáttanum og lógarbundnum játtanum á landsstýrismannaøkjunum. Løgujáttanir eru ikki við í talvunum niðanfyri. Tó eru løgukendar játtanir frámerktar við *.
Serstakt løgujáttanareftirlit er síðst í frágreiðingini eftir rakstrarjáttanareftirlitið.

§ 1 Løgtingið

Játtanarliga støðan í september 2026

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
10.1.02.	Eftir- og bíðiløn til løgtingsmenn	Lógarbundin játtan	100	Eykajáttan apríl og mett frávik
Tilsamans			**100**	

Meting av útreiðslum á § 1 í 2026 sammett við fíggjarlógina fyri 2026

1.000 kr.	FL-2026	Meting 2026	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	0	0	0	0,0%
Rakstrarjáttan	82.149	82.149	0	0,0%
Lógarbundin játtan	14.700	14.800	100	0,7%
Tilsamans	**96.849**	**96.949**	**100**	**0,1%**

§ 2 Løgmansfyrisitingin

Játtanarliga støðan í september 2026				
Høvuðs-konta	**Stovnur/játtan**	**Játtanarslag**	**Frávik** *(tús. kr.)*	**Viðmerking**
11.1.02.	Løgmansskrivstovan	Rakstrarjáttan	-430	Eykajáttan sept.
14.1.04.	Føroya Kærustovnur	Rakstrarjáttan	300	Eykajáttan sept.
14.1.14.	Advokatumboðan	Lógarb. játtan	240	Eykajáttan sept.
Tilsamans			**110**	

Meting av útreiðslum á § 2 í 2026 sammett við fíggjarlógina fyri 2026				
1.000 kr.	**FL-2026**	**Meting 2026**	**Frávik**	**Frávik (%)**
Stuðulsjáttan	5.680	5.680	0	0,0%
Rakstrarjáttan	60.334	60.204	-130	-0,2%
Lógarbundin játtan	600	840	240	40,0%
Tilsamans	**66.614**	**66.724**	**110**	**0,2%**

§ 3 Fíggjarmál

Játtanarliga støðan í september 2026

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
15.1.04.	TAKS	Rakstrarjáttan	2.800	Eykajáttan mai og sept.
22.4.01.	Stuðul til rentuútreiðslur	Lógarb. játtan	6.000	Eykajáttan sept.
Tilsamans			**8.800**	

Meting av útreiðslum á § 3 í 2026 samanborið við fíggjarlógina fyri 2026

1.000 kr.	FL-2026	Meting 2026	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	300	300	0	0,0%
Rakstrarjáttan	183.284	186.084	2.800	1,5%
Lógarbundin játtan	290.700	296.700	6.000	2,1%
Tilsamans	**474.284**	**483.084**	**8.800**	**1,9%**

§ 5 Uttanríkis- og fiskivinnumál

Játtanarliga støðan í september 2026

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
11.1.05.	Uttanríkis-og fiskimálaráðið	Rakstrarjáttan	975	Eykajáttan sept.
34.2.01.	VØRN, Fiskiveiðieftirlitið	Rakstrarjáttan	3.000	Eykajáttan sept.
34.3.01.	Havstovan	Rakstrarjáttan	300	Eykajáttan sept.
34.3.07.	Fiskivinnuroyndir	Rakstrarjáttan	-600	Eykajáttan sept.
Tilsamans			**3.675**	

Meting av útreiðslum á § 5 í 2026 sammett við fíggjarlógina fyri 2026

1.000 kr.	FL-2026	Meting 2026	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	21.175	21.175	0	0,0%
Rakstrarjáttan	253.814	257.489	3.675	1,4%
Lógarbundin játtan	1.200	1.200	0	0,0%
Tilsamans	**276.189**	**279.864**	**3.675**	**1,3%**

§ 6 Vinnumál

Játtanarliga støðan í september 2026				
Høvuðs-konta	**Stovnur/játtan**	**Játtanarslag**	**Frávik** *(tús. kr.)*	**Viðmerking**
14.1.10.	Útlendingastovan	Rakstrarjáttan	330	Eykajáttan mai
37.2.04.	Endurgjald til skipasmíð	Stuðulsjáttan	4.000	Eykajáttan sept.
Tilsamans			**4.330**	

Meting av útreiðslum á § 6 í 2026 sammett við fíggjarlógina fyri 2026				
1.000 kr.	**FL-2026**	**Meting 2026**	**Frávik**	**Frávik (%)**
Stuðulsjáttan	79.045	83.045	4.000	5,1%
Rakstrarjáttan	386.835	387.165	330	0,1%
Lógarbundin játtan	0	0	0	0,0%
Tilsamans	**465.880**	**470.210**	**4.330**	**0,9%**

§ 7 Mentamál

Játtanarliga støðan í september 2026

Høvuðs-Konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
21.3.01.	Barnavernd	Lógarb. játtan	820	Eykajáttan sept.
21.3.14.	Barnaverndarstovnar	Rakstrarjáttan	-2.000	Eykajáttan sept.
23.1.06.	Føroyskt sum annaðmál, vaksin	Rakstrarjáttan	-1.250	Eykajáttan mai
23.2.01.	Fólkaskúlin	Rakstrarjáttan	9.000	Eykajáttan mai og sept.
23.2.02.	Sernám	Rakstrarjáttan	1.200	Eykajáttan mai og sept.
23.2.03.	Stuðul til fólkaskúlar	Stuðulsjáttan	200	Eykajáttan mai
23.3.05.	Miðnámsútbúgvingar	Rakstrarjáttan	3.176	Eykajáttan mai og sept.
23.5.02.	Ítróttaháskúlin í Suðuroy, løgustuðul*	Stuðulsjáttan	2.600	Eykajáttan mai
23.6.24.	Altjóða granskingar- og menningar-samstarv	Stuðulsjáttan	-3.500	Eykajáttan sept.
23.7.04.	Lestrarstuðul	Lógarb. játtan	-1.500	Eykajáttan mai og sept.
Tilsamans			**8.746**	

Meting av útreiðslum á § 7 í 2026 samanborið við fíggjarlógina fyri 2026

1.000 kr.	FL-2026	Meting 2026	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	184.319	183.619	-700	-0,4%
Rakstrarjáttan	1.330.562	1.340.688	10.126	0,8%
Lógarbundin játtan	154.308	153.628	-680	-0,4%
Tilsamans	**1.669.189**	**1.677.935**	**8.746**	**0,5%**

* Hendan játtanin telur við sum løgukend útreiðsla í høvuðstalvuni á bls. 27.

§ 11 Heilsu- og orkumál

Játtanarliga støðan í september 2026

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
20.1.10.	Koppsetingar	Lógarb. játtan	2.000	Eykajáttan sept.
20.2.02.	Heilsutrygd	Rakstrarjáttan	-2.000	Eykajáttan sept.
20.2.03.	Heilsutrygdarveitingar	Rakstrarjáttan	-8.000	Eykajáttan mai og sept.
20.2.04.	Kommunulæknaskipanin	Rakstrarjáttan	-1.800	Eykajáttan sept.
20.3.04.	Landssjúkrahúsið	Rakstrarjáttan	6.830	Eykajáttan mai og sept.
20.3.10.	Klaksvíkar sjúkrahús	Rakstrarjáttan	1.028	Eykajáttan mai og sept.
20.3.15.	Suðuroyar sjúkrahús	Rakstrarjáttan	957	Eykajáttan mai og sept.
20.3.19.	Serstakur sjúkrahúsheilivágur	Rakstrarjáttan	800	Eykajáttan sept.
20.3.24.	Sjúklingatrygging	Lógarb. játtan	4.000	Eykajáttan sept.
Tilsamans			**3.815**	

Meting av útreiðslum á § 11 í 2026 sammett við fíggjarlógina fyri 2026

1.000 kr.	FL-2026	Meting 2026	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	9.863	9.863	0	0,0%
Rakstrarjáttan	1.769.175	1.766.990	-2.185	-0,1%
Lógarbundin játtan	15.770	21.770	6.000	38,0%
Tilsamans	**1.794.808**	**1.798.623**	**3.815**	**0,2%**

§ 12 Almanna- og bústaðamál

Játtanarliga støðan í september 2026

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
11.1.26.	Almann- og bústaðamálaráðið	Rakstrarjáttan	-430	Eykajáttan mai
11.1.63.	Javnstøðumál	Rakstrarjáttan	100	Eykajáttan mai
21.1.02.	Almannaverkið	Rakstrarjáttan	500	Eykajáttan mai
21.3.09.	Familjuískoyti	Lógarb. játtan	-2.300	Mett frávik
21.4.01.	Dagpeningaskipanin	Lógarb. játtan	3.500	Eykajáttan sept.
21.6.25.	Bústovnar, løgustuðul*	Stuðulsjáttan	0	Eykajáttan mai og mett frávik
21.7.01.	Almannatrygd	Lógarb. játtan	-890	Eykajáttan sept.
21.7.02.	Arbeiðsfremjandi tiltøk	Lógarb. játtan	1.500	Eykajáttan sept.
21.8.01.	Fólkapensjón	Lógarb. játtan	5.000	Eykajáttan sept.
21.8.05.	Fyritíðarpensjón	Lógarb. játtan	-9.900	Eykajáttan sept.
21.8.13.	Viðbót til ávísar pensjónistar	Lógarb. játtan	-500	Eykajáttan sept.
22.4.05.	Leigustuðul	Lógarb. játtan	6.000	Eykajáttan mai
Tilsamans			**2.580**	

Meting av útreiðslum á § 12 í 2026 samanborið við fíggjarlógina fyri 2026

1.000 kr.	FL-2026	Meting 2026	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	35.704	35.704	0	0,0%
Rakstrarjáttan	669.275	669.445	170	0,0%
Lógarbundin játtan	1.603.552	1.606.062	2.410	0,2%
Tilsamans	**2.308.631**	**2.311.211**	**2.580**	**0,1%**

* Hendan játtanin telur við sum løgukend útreiðsla í høvuðstalvuni á bls. 27.

Inntøkujáttanareftirlit

Játtanarliga støðan í september 2026

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
50.2.10.	Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank	Ógreinað	9.945	Nýggj meting
52.1.01.	Vanligur landsskattur	Ógreinað	105.000	Nýggj meting
52.1.07.	Felagsskattur	Ógreinað	25.000	Nýggj meting
52.1.11.	Kapitalvinningsskattur	Ógreinað	35.000	Nýggj meting
52.1.12.	Skattur av vinningi frá sølu av veiðirættindum	Ógreinað	10.000	Nýggj meting
52.1.25.	Arvaavgjald	Ógreinað	-2.000	nýggj meting
52.2.01.	Meirvirðisgjald	Ógreinað	10.000	Eykajáttan mai og nýggj meting
52.2.04.	Tollavgjøld	Ógreinað	5.000	Nýggj meting
52.2.07.	Punktgjøld	Ógreinað	-15.000	Nýggj meting
52.2.10.	Lønarhæddaravgjald	Ógreinað	1.000	Nýggj meting
52.2.14.	Loyvisgjald á alivinnu	Ógreinað	-6.000	Nýggj meting
52.2.15.	Avgjald á fiskatilfeingi	Ógreinað	21.000	Nýggj meting
52.2.19.	Skrásetingargjald	Ógreinað	20.000	Nýggj meting
52.2.30.	Tinglýsingargjald	Ógreinað	6.000	Nýggj meting

52.3.04.	Útluting frá partafeløgum og grunnum	Ógreinað	-28.000	Nýggj meting
52.5.01.	Endurrindan av keyps-MVG	Ógreinað	5.000	Nýggj meting
52.5.04.	Endurrindan fyri DIS/FAS inntøkur	Ógreinað	1.000	Nýggj meting
Tilsamans			**202.945**	

Løgujáttanareftirlit

Løgukarmurin í fíggjarlógini fyri 2026 er um 497 mió. kr. tilsamans. Harafturat eru løgukendar játtanir (løgustuðul) á um 119 mió. kr. í fíggjarlógini fyri 2026, og um 313 mió. kr. av løgujáttanum eru fluttar fram frá undanfarna ári. Samlaða játtanin til løgur og løgukendar útreiðslur við framfluttum játtanum og eykajáttanum er sostatt um 930 mió. kr. í 2026.

Roknast kann við, at um 585 mió. kr. verða nýttar av løgujáttanunum í 2026, og mett verður, at um 350 mió. kr. verða fluttar fram til 2027. Torført er at meta um nýtsluna av løgujáttanum fyri árið, og metingarnar skulu tí lesast við fyrivarni.

Heiti *(1.000 kr.)*	**Flutt frá eldri árum**	**FL 2026**	**EyJ 2026**	**Játtan tils. 2026**	**Mett nýtsla 2026**	**Mett flyting til 2027**
§ 1 Løgtingið	**0**	**34.200**	**0**	**34.200**	**24.200**	**10.000**
Løgtingsbygningurin	0	34.200	0	34.200	24.200	10.000
§ 2 Løgmansfyrisitingin	**1.938**	**3.000**	**0**	**4.938**	**4.938**	**0**
Umbygging í Tinganesi	1.938	3.000	0	4.938	4.938	0
§ 3 Fíggjarmál	**13.017**	**36.000**	**200**	**49.217**	**36.367**	**12.850**
Búskaparstovnar landsins	0	0	1.000	1.000	1.000	0
Talgildu Føroyar	1.364	15.000	0	16.364	12.864	3.500
TAKS, løgujáttan (skannari)	0	1.500	0	1.500	950	550
Búskaparskipan landsins	0	3.000	0	3.000	1.500	1.500
Nýggj skattaskipan	11.653	16.500	-800	27.353	20.053	7.300
§ 5 Uttanríkis- og fiskivinnum.	**0**	**6.400**	**0**	**6.400**	**6.400**	**0**
Tilbúgvingarætlan	0	6.400	0	6.400	6.400	0

framhald...

...framhald

§ 6 Vinnumál	**127.199**	**242.900**	**0**	**370.099**	**246.324**	**132.256**
Umvæling av almennum bygn.	66	37.700	0	37.766	37.266	500
Almennir bygningar, søla	0	-16.200	0	-16.200	-7.273	0
Innkomuvegur Runavík	25.591	0	0	25.591	0	25.591
Landsins ognir	0	4.000	4.000	8.000	8.000	0
Almenn jørð, søla	0	0	0	0	-446	0
Nýggir landsvegir	73.549	66.900	-4.000	136.449	86.449	50.000
Havnir	3.813	2.000	0	5.813	5.813	0
Vegastrekki í Tvøroyrar komm.	0	5.500	0	5.500	1.700	3.800
Strandfaraskip landsins	19.265	43.000	0	62.265	14.500	47.765
Flogferðsla, løga	4.915	0	0	4.915	315	4.600
P/F Suðuroyartunnil *	0	100.000	0	100.000	100.000	0
§ 7 Mentamál	**52.826**	**128.500**	**0**	**181.326**	**87.674**	**91.950**
KT-skipan til skúlaverkið	0	2.600	0	2.600	2.600	0
Skúlatilboð til ung [...] (Rásin)	0	0	0	0	-125	0
Miðnám á Kambsdali	6.370	0	8.000	14.370	3.470	10.900
Tekniski skúli í Klaksvík	9.319	15.000	0	24.319	23.319	1.000
Miðnám í Vestmanna	0	2.300	0	2.300	2.300	0
Fróðskaparsetur Føroya	19.112	57.000	-10.600	65.512	20.112	45.400
Avh. og útv. av ognum [...]	0	0	0	0	-1.577	0
Tjóðleikhús	7.680	0	0	7.680	180	7.500
Tjóðsavnið	3.580	25.000	-3.500	25.080	5.080	20.000
Varðveiting av mentanararvinum	2.682	6.000	3.500	12.182	7.682	4.500
Listasavn Føroya	4.083	3.500	0	7.583	7.583	0
Kringvarp Føroya, tøknilig útgerð	0	3.000	0	3.000	350	2.650
Víkingagarður í Hovi *	0	100	0	100	100	0
Ítróttaháskúlin í Suðuroy *	0	0	2.600	2.600	2.600	0
Mentanarhús í Klaksvík *	0	1.000	0	1.000	1.000	0
Sjósavn *	0	5.000	0	5.000	5.000	0
Krígssavn *	0	1.000	0	1.000	1.000	0
Stuðul til kirkjubygging *	0	7.000	0	7.000	7.000	0

framhald...

...framhald

§ 11 Heilsu- og orkumál	**78.228**	**107.100**	**0**	**185.328**	**113.628**	**71.700**
Nýggj talgild heilsuskipan	6.035	3.500	0	9.535	9.535	0
Apoteksverkið	6.053	8.800	0	14.853	6.053	8.800
Medicoteknisk tól	6.763	10.300	0	17.063	14.663	2.400
Landssjúkrahúsið, útbygging	37.441	41.800	0	79.241	40.741	38.500
Klaksvíkar sjúkrahús	7.569	26.000	0	33.569	23.569	10.000
Suðuroyar sjúkrahús	10.499	6.500	0	16.999	4.999	12.000
Hamragarður	3.868	4.000	0	7.868	7.868	0
Umhvørvisstovan	0	1.500	0	1.500	1.500	0
Landstreymsverkætlanir *	0	3.000	0	3.000	3.000	0
Tól og útgerð til heilsutænastur...*	0	1.700	0	1.700	1.700	0
§ 12 Almanna- og bústaðamál	**40.074**	**58.000**	**0**	**98.074**	**65.074**	**29.000**
Almannaverkið, KT-skipan	0	5.000	0	5.000	5.000	0
Bústovnar o.a.	40.074	53.000	-4.500	88.574	59.574	29.000
Sjóndepilin	0	0	500	500	500	0
Bústovnar, løgustuðul *	0	0	4.000	4.000	0	0
Løgujáttanir tilsamans	**313.282**	**616.100**	**200**	**929.582**	**584.570**	**347.791**

* Løgukendar útreiðslur.